

## Hjalti dansaði seg til oddasessin

12 ára gamli Hjalti W. Dahl Christiansen, dansaði seg inn í hjørtuni hjá dómarunum, og gjørdist fríggjakvøldið ársins Talent í Margarinfabrikkini. Fríggjadagin 15. mai var finalan í talentkappingini, sum Margarinfabrikkin skipaði fyri. Tveir dagar áðrenn finaluna var innleiðandi umfar, og vóru tað fimm innsløg, sum komu víðari til finaluna, at kappaðust um at vera ársins talent í Margarinfabrikkini og eigarin av einum Ipod Nano frá Ekspert. Umleið 80 børn og ung høvdu leitað sær oman í Margarinfabrikina fríggjadagin og eisini vóru nøkur foreldur,ommur og abbar sum áhoyrarar. Kappingin byrjaði við, at ungi bólkurin Plastic Hero, sum venja uppiá í Margarinfabrikkini, spældu nøkur løg og fingu lív í fjøldina, áðrenn kappingin byrjaði. Luttakararnir bæði dansaðu og sungu, men tað var bert ein vinnari av kappingini og tað bleiv 12 ára gamli Hjalti W. Dahl Christiansen, sum dansaði seg inn í hjørtuni hjá dómarunum. Hann dansaði robotdans til lagið "Robot Music"við Turf Talk. Fyriskiparar og børnini í Margarifabrikkini vóru sera væl nøgd við tiltakið, sum avgjørt verður afturvendandi tiltak niðri í Margarinfabrikkini.

# Tórsdagur breyt samskiparan sundur

**Elin Wang, samskipari, var bara ein av fimm fólkum, sum brutu seg sundur, tá Tórshavnar kommuna skipaði fyri ítróttardegi fyri starvsfólkini um vikuskiftið. Sjálv fekk hon størsta skaðan, tá hon breyt annan armin, keikti hin og fekk snuddir í andlitið**




*Elin Wang, samskipari, breyt annan armin og keikti hin á Tórsdegi leygardagin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

SKAÐAR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tað endar ikki altíð líka lukkuligt, tá kantórmýs verða koyrdar út at flyta seg. Hetta mátti Elin Wang, sum sjálv skipaði fyri Tórsdegnum, sanna, tí tá hon skuldi loypa upp um ein plint uttanfyri badmintonhøllina gekk heilt galið.

- Eg veit ikki reiðiliga, hvat hendi, men annað beinið kom ikki upp um plintin, so eg fór sendandi fram eftirrommum, men samarittarnir vóru har beinanvegin at taka sær av mær. Sindur undarligt, at fyriskiparin skal vera tann fyrsta, sum fær skaða, greiðir Elin Wang frá.

Hon var langt frá tað einasta av teimum fleiri enn 700 fólkunum á degnum, sum fekk skaða. Ein breyt fótliðið, ein keikti armin og tvey fingu snudd í andlitið.

Men tá talan er um fleiri enn 700 fólk, so er Tórshavnar kommuna ikki heilt lamin av degnum.

Tá fólk fáa skaða soleiðis, so gevur tað vanliga nakrar sjúkradagar, so kanska er tað ikki so sunt at loyva kantórmýsnum av borgini.



*Bláa eygað og penturnar fekk Elin Wang somuleiðis, tá hon fór sendandi skeivt upp um ein plint við Badmintonhøllina leygardagin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Ein góður dagur

Hóast Elin Wang fekk skaða á Tórsdegi, sum hevði savnað øll starvsfólk hjá Tórshavnar kommunu, so heldur hon, at dagurin eydnaðist heilt væl.

Tey byrjaðu longu klokkan 9 leygarmorgunin við upphiting. Síðan var kapping gjøgnum tað mesta av degnum har millum annað postarenning, togtogan, longdarlop og renning vóru á skránni, í og kring ymiskar hallir og á Tórsbreyt.

Klokkan 16 endaði sjálv kappingin við eini kapping um at mjólka. Fimm kýr vóru funnar fram, og so sluppu luttakarar at kappast um tað eisini.

### Borgarstjórin silvur

Tá talt var upp, gjørdist greitt, at Heðin Mortensen, borgarstjóri, og Jens Marius Poulsen, kommunustjóri, sum vóru á liði saman, ikki vóru á vinnandi liðnum, men helst hava teir ikki verið so vónbrotnir, tí teir endaðu við at fáa silvur.

Heðin Mortensen er fegin um silvurið, hóast hann ætlaði at vinna.

- Sjálvandi vildi eg vinna, men silvur man vera í lagi, sigur borgarstjórin.

### Endaðu við veitslu

Tá ítróttartiltøkini vóru av, fóru ymisku partarnir, hvør til sín at fáa sær ein bita. Tey flestu fóru at eta saman, og longu klokkan 21 hittust øll aftur í høllini á Hálsi, har veitsla var hildin fyri øllum.

Eisini Elin Wang var í veitslu. Tá hevði hon verið á skaðstovuni, har hon hevði fingið gips á armin og nakrar pentur.

- Ja, klokkan tvey var eg har uppi aftur, sigur Elin Wang, sum heldur at tað er vinnaraandin í fólki, sum gjørdi, at tað vóru so nógv, sum fingu skaða.